T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir einum pedagogi til býlingshúsið á Ternuryggi at byrja 1. januar 2002 ella eftir avtalu.

Talan er um eitt pedagogstarv, 30 tímar um vikuna, í eini barnagarðstovu.

.

Stovnslýsing
Í býlingshúsinum á Ternuryggi ganga 52 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðstovum við 20 børnum í hvørjari og eini vøggustovu við 12 børnum.

Á stovnunum arbeiða 4 pedagogar og 8 hjálparfólk.

Vit ynskja
- at tú hevur góð samstarvsevnir ,
- ert røkin, álítandi og nærløgd/nærlagdur.
- at tær dámar væl at vera úti í nattúruni saman við børnunum
- at tú er før/førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum
- at tú dugir væl at finna uppá og hugsa nýtt, tá ið tað snýr seg um at arbeiða við 3 til 7 ára gomlum børnum.

Vit bjóða
eitt áhugavert starv.
- Har tú hevur møguleika fyri at gera tína ávirkan galdandi.
- Har tú saman við starvsfólkunum er við til at gera barnagarðin til eitt mennandi og trygt stað.

Setanarviðurskifti
Løn sambært sáttmálanum ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Meira fæst at vita
um størvini við at venda sær til Heidi Henriksen, leiðara tlf. 318626, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

Umsóknir
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu verða Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 3.desember.

S N A R S K I V A N

Postverk Føroya

Jólapostur 2001

Jólapostur til grannalondini eigur at vera á posthúsi í Tórshavn ikki seinni enn:

	Flogpostur A-brøv	Flogpostur Pakkar	Skipspostur B-brøv	Skipspostur Pakkar
Bretland	17.12	11.12	06.12	22.11
Danmørk	17.12	14.12	13.12	13.12
Finnland	13.12	13.12	06.12	06.12
Grønland, Nuuk	14.12	07.12	29.11	29.11
Ísland	13.12	13.12		
Noreg	14.12	12.12	13.12*	06.12
Svøríki	17.12	14.12	13.12	13.12

* B-brøv til postnr. 8000-9999 í Noregi tó 06.12.01.

Upplýsingar um seinastu freistir til útheimin eru at fáa á posthúsunum, tlf 311007 og www.post.fo
Tað er umráðandi fyri skjóta tollavgreiðslu í móttakaralondunum, at tollsøgnin er týðilig og fullfíggjað.

Veðurlíkindi kunnu gera, at postur verður seinkaður - tí verður rátt til at senda hann í góðari tíð.

Innanlands
Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi **týsdagin 18. desember.**

Tilskriftarleysar sendingar til útberingar fyri jól

Seinasta freist fyri innlating:
Til útberingar fyri vanligt postgjald: mánadagin 10. desember kl. 12.00.
Til útberingar fyri hægri postgjald: mikudagin 12. desember kl. 12.00.

13. - 14. desember verða tilskriftarleysar sendingar bert bornar út, um hægri postgjald verður goldið. Frá og við 13. desember fram til jóla verður ikki tikið ímóti tilskriftarleysum sendingum.

Hækkaða postgjaldið fyri sendingar til útberingar 13. - 14. desember:
Fyri sendingar upp í 100 g: 40 oyru eyka fyri hvørja.
Fyri sendingar yvir 100 g: 60 oyru eyka fyri hvørja.

Postverk Føroya ynskir øllum viðskiftafólkum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár !

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

Opið hús

Í samband við fólkatingsvalið verður opið hús valdagin í javnaðarhølinum á Áarvegnum.

Øll eru vælkomin inn á gólvið til prát, drekkamunn og fylgja gongdini í valinum.

Nevndin

Kunngerð

Eyka bygdarráðsfundur verður hósdagin 22. november 2001 kl. 19.30.

Regluligi bygdarráðsfundurin, sum skuldi vera 3. desember 2001, er fluttur til mánadagin 10. desember 2001 kl. 17.00.

Leirvíkar Bygdarráð

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 931, P/F Varðin, 510 Gøta.

Viðtøkur broyttar: 06.11.2001
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 23.06.2001 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 18.060.000,00.

Skráseting Føroya tann 15. november 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2441, Sp/f Elding, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 14.11.2001.
Strikan av hjánavni: Sp/f Miðlon (Sp/f Elding)

Skráseting Føroya tann 15. november 2001

Kristin Balle

ÍBýin - hvønn hósdag

Við Sosialinum ÍBÝIN

PR-starv í SvF

Kanst tú selja sjónvarpið?

Nei, tað er ikki einum sølufólki í vanligari merking vit leita eftir.
Men einum medarbeiðara, sum kann finna tað áhugaverda, stuttliga og spennandi burtur úr tí, sum SVF framleiðir og sendir, og bera tað út til hyggjararnar gjøgnum sjónvarpsskíggjan, eina virkna heimasíðu og tilrættaløgd upplýsingartiltøk. Tú skalt lýsa sjónvarpið í sjónvarpinum. Vera okkara egna PR-fólk.

Uppgávurnar:
Tú skalt leggja til rættis og skriva "reyp" (styttri innsløg um komandi sendingar), leggja til rættis upplýsingartiltøk í sambandi við teir ymisku tættirnar í virksemi sjónvarpsins og hava um hendur dagligu umsitingina av heimasíðu okkara. Tú skalt finna nýggjar hættir at seta fokus á sendingar okkara og í samráð við leiðsluna leggja strategiina fyri lýsing sjónvarpsins av sær sjálvum og sínum virksemi.

Tú verður knýtt/ir at skrádeildini, sum hoyrir beinleiðis undir stjóran, men kemur at samstarva við allar deildir í húsinum. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt fjøltáttað og spennandi starv við fjølbroyttum uppgávum og nógvum avbjóðingum.

Útbúgving og royndir:
Tú hevur útbúgving innan fjølmiðlar ella lýsingargerð, og hevur starvsroyndir frá fjølmiðlum og /ella lýsingarstovum. Tú dugir væl at skriva tekstir, men hevur samstundis so mikið av vitan um grafiska formgeving, at tú kanst viðgera og taka støðu til grafisk hugskot og geva grafikarum og myndafólki ítøkiligar uppgávur. Tú dugir at hugsa strategiskt og leggja longri upplýsingarátøk til rættis. Tú ert kreativ/ur og hevur lætt við at samstarva.

Løn og setanartreytir:
Starvið verður sett og lønt sum programmfólkastarv sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Starvið er lønt í lønarbólki 6 og verður sett frá 1. januar, 2002.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember. Talan er í fyrsta umfari um eina 1-árs royndarverkætlan fram til 31. desember, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra, tel 340400.

svf
Sjónvarp Føroya

Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi, umframt handilsligum virksemi.

team85

Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetniskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Sandoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 2 starvsfólk. Sandoyar Øki tekur sær av dagligum avgreiðslum.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail
tollskatt@tollskatt.fo

Starv sum málsviðgeri

Søkt verður eftir málsviðgera til Sandoyar Øki. Vegna ov fáar umsøknir, tá ið hetta starv varð lýst leyst seinast, verður starvið lýst leyst av nýggjum.

Høvuðsuppgávur
Álíkningar- og eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald og toll, skatt og innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiðið er rættuliga sjálvstøðugt, tí tann, ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir. Í ivamálum hevur hann beinleiðis tilvísing til deildirnar í Stýrinum.

Førleikakrøv
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar bæði á stovninum og uttan fyri stovnin eitt nú á handilsskúla v.m. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Eisini er ynskiligt, men tó ongin treyt, at viðkomandi býr í Sandoynni.

Vit kunna bjóða
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

Setanartreytir
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Núverandi setanarøkið er Sandoyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri upplýsingar kunnu fáast hjá Randi Røsvik, roknskaparleiðara, á tlf. 35 26 00.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

30. november 2001

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

The Windsmith
v/ John S. Müller

Ring og royn
eitt blásaraljóðføri við ráðgeving frá útbúnum og royndum fakmanni

Søla
Nýggj Yamaha blásaraljóðføri tøk

Tænasta
3 mðr. ókeypis fínstilling av ljóðførum, sum latin eru av blásaraverkstaðnum við Marknagilsvegin 18

fartlf. 219721 · e-mail: windsmit@post.olivant.fo

Bilsmiður søkist

Vit søkja eftir bilsmiði til verkstað okkara at byrja skjótast møguligt. Um hetta hevur tín áhuga, set teg í samband við verkstaðarleiðaran Óla Niclassen, tlf. 310600, lokal 12, ella send okkum eina umsókn.

P/f D. B. Bilar
J. Broncksgøta 15
100 Tórshavn
Tlf. 310 600

SALTANGARÁ

Vit flyta í nýggj høli í Saltangará

Í samband við at vit flyta í nýggj høli í Saltangará, skulu vit boða frá, at handilin verður stongdur frá leygardegnum 17. november.

Lýst verður í komandi viku, nær vit lata upp aftur.

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

Uppsetan og skipan av barrum

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt



Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

Bilar Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn

Restorffs ASSU